# Oljuavgjaldið kann skjótt lækka

**Prísurin á ráolju er lækkaður við einum triðingi í eitt hálvt ár. Tað gevur grundarlag fyri at umhugsa at lækka serliga oljuavgjaldið sum kom uppá flogferðaseðlarnar fyri trimum árum síðani**

FLOGFERÐSLA
*Gunnar Skúvadal*

Hann lovar onki. Men tað er meira sannlíkt nú, tá oljuprísurin er lækkaður so nógv, at serliga oljuavgjaldið á flogferðaseðlum fyrst minkar, og síðani, um prísurin á ráolju heldur fram at lækka, heilt verður tikið burtur. Stjórin í Atlantic Airways, Magni Arge, sigur, at fyribils hava tey eyguni við prísinum, og bíða. Oljuavgjaldið hjá Atantsflogi er í dag uppá 120 krónur á ein einvegis ferðaseðil. Tað ljóðar kanska ikki av so nógvum, men er kortini ein munandi partur av bílagastu ferðaseðlunum, sum kosta 695 krónur. Ein lítil helvt av hesi upphæddini eru avgjøld av ymsum slag.

## Lækkað nógv

Tá oljuprísurin var hægstur, í juli í fjør, kostaði ein tunna av ráolju yvir 78 dollarar. Nú liggur hon um 52 dollarar. Ráoljan er sostatt minkað í virði við einum triðingi í eitt hálvt ár.

- Tað er til at føla uppá, og hevur stóran týdning fyri kappingarførið og raksturin annars hjá okkum. Men ein minking slær ikki ígjøgnum beinanvegin, tí vit keypa olju til ein fastan prís nakað fram í tíðina, sigur Magni Arge. Tað er vanligt hjá teimum, sum brúka nógva olju, harímillum eisini hjá flogfeløgum, at tryggja sær oljuna til ein ávísan prís, tá útlitini eru vánalig, so tey ikki verða rakt ov meint av sveiggjum í prísinum, og soleiðis betur fáa lagt ætlanir. Vanliga tryggja tey ein part av oljuni, til dømis helvtina, í eitt tíðarskeið, tað kann vera eitt hálvt ár fram.

- Men he ldur prísurin fram av lækkað, ella heldur hann sær nóg leingi á stiginum, sum hann nú er á, so kann roknast við at oljuavgjaldið fer at lækka, sigur Magni Arge. Hann vil tó ikki siga, hvussu long tíð skal ganga, áðrenn kundin fær bíligari ferðaseðlar, tí oljuavgjaldið er lækkað.

## Langt á botn

Tað er kortini langt niður til tann prísin, sum var, tá Atlantsflog eins og flest onnur flogfeløg kring heimin løgdu serliga oljuavgjaldið omaná prísin, fyri at standa ímóti ógvusligu príshækkingunum.

- Tá lá prísurin um 35 dollarar fyri tunnuna, og vit fingu á ongan hátt fulla kompensatión gjøgnum avgjaldið. Tað kom okkum als ikki til hugs, at prísurin kundi fara heilt upp á nærum 80 dollarar, vísir Magni Arge á. Og fyrr enn oljuprísurin aftur er komin har niður, kemur ikki upp á tal at taka avgjaldið heilt av. Atlantic Airways brúkar árliga einar 30 milliónir litrar av olju, og oljan er ein stórur partur av útreiðslunum. Tí sæst tað skjótt aftur í roknskapinum, tá oljuprísurin broytist. Tað er galdandi fyri øll flogfeløg, og tey flestu hava valt fyribils ikki at taka oljuavgjaldið av.

## Kann skjótt fara uppaftur

Nakað annað er so tað, at ongin trygd er fyri, at oljuprísurin ikki fer uppaftur skjótt. Fleiri serfrøðingar halda, at hann um eitt ár væl kann liggja omanfyri 100 dollarar fyri tunnuna, og sostatt enn hægri, enn tá hann var hægstur í summar.

- Vandin fyri yvirgangi er ikki minni nú, hóast tað kanska ikki er so nógv frammi, og støðan er framvegis sera spent í arabiska heiminum, har ein stórur partur av oljuni verður framleiddur, sigur Magni Arge. Hann stúrir fyri, at langtíðar rákið á oljuprísinum framvegis er uppeftir.

- Nýtslan veksur skjótari, enn vit finna nýggjar oljukeldur, og tað verður ikki fyrr enn aðrar orkukeldur av álvara koma fram og verða brúktar, at trýstið á oljuprísin fer at minka, sigur Magni Arge.





Starvslýsing

Stuðulstænastan

## 5 starvsfólk til nýggja sosialpsykiatriska sambýlið á Bóndaheygi 3 í Suðurstreymoy

Í nýggja sambýlinum koma at búgva 6 sinnisveik fólk, ið hava tørv á eginumsorgan, tryggleika og einum struktureraðum gerandisdegi.

Ymiskt virksemi verður bæði inni og uttan fyri húsið, har starvsfólkini fara at luttaka aktivt saman við búfólkunum. Felags fyri búfólkini er, at tey vegna skerdan sálarligan førleika hava tørv á stuðli.

**Arbeiðið hjá starvsfólkunum fevnir m.a. um:**
- At stimbra og menna praktiskar og sosialar førleikar hjá búfólkunum.
- At skipa so fyri, at búfólkini fáa møguleika at leggja gerandislív sítt soleiðis til rættis, at tað verður í samsvari við egnan tørv og normar.
- At bøta um møguleikan hjá búfólkunum at skapa eitt trygdarnet.

**Førleikakrøv:**
Vit vænta, at tú:
- Vísir áhuga og virðing fyri búfólkunum og samstundis arbeiðir professionelt.
- Ert stuðlandi og hjálpir búfólkunum uttan at taka ábyrgdina fyri lívinum frá teimum.
- Hevur hug og hegni til at arbeiða í einum tvørfakligum umhvørvi.
- Ert tolin og hevur eina positiva menniskjafatan.
- Hevur eina viðkomandi sosial- ella heilsufakliga útbúgving.

**Stuðulstænastan bjóðar:**
- Eitt spennandi arbeiðspláss við møguleikum fyri persónligari og fakligari menning.
- Ein virknan tvørfakligan starvsfólkahóp.
- Samávirkan á gerandis uppgávur
- Kunning í arbeiðnum og supervisión.

**Lønar- og setanartreytir:**
Talan er um 5 fulltíðarstørv innan Nærverkið, og roknast má við, at arbeiðstíðirnar eru skiftandi dag-, kvøld-, og vikuskiftisarbeiði. Løn sambært avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.
Tann, ið settur verður, má kunna tola broytingar í starvinum, og at hetta kann verða umskipað til eisini at fevna um aðrar uppgávur.
Fleiri upplýsingar um størvini eru at fáa hjá Odu Jóhansdóttir, tlf. 354024 ella Regin Johansen, deildarleiðara, tlf. 354020.
Størvini verða sett 01.04.2007 ella skjótast møguligt aftaná.

**Umsókn:**
Umsókn við avriti av prógvum v.m. skal sendast til:
Stuðulstænastan fyri vaksin
Løkjatún 1
160 Argir
Stílað: Regin Johansen

**Umsóknarfreist:**
5. februar 2007.

Stuðulstænastan

## Starvsfólk til sambýlið á Traðarvegi í Sandavági

Í sambýlinum búgva 5 sinnisveik fólk, ið hava tørv á eginumsorgan, tryggleika og einum struktureraðum gerandisdegi.

Ymiskt virksemi er bæði inni og uttan fyri húsið, har starvsfólkini luttaka aktivt saman við búfólkunum. Felags fyri hesi fólk er, at tey vegna skerdan sálarligan førleika hava tørv á stuðli.

**Førleikakrøv:**
Vit vænta, at tú:
- Vísir áhuga og virðing fyri búfólkunum og samstundis arbeiðir professionelt.
- Ert stuðlandi og hjálpir búfólkunum uttan at taka ábyrgdina fyri lívinum frá teimum.
- Hevur hug og hegni til at arbeiða í einum tvørfakligum umhvørvi.
- Tú hevur eina viðkomandi sosial- ella heilsufakliga útbúgving.

**Stuðulstænastan bjóðar:**
- Eitt spennandi arbeiðspláss við møguleikum fyri persónligari og fakligari menning.
- Ein virknan tvørfakligan starvsfólkahóp.
- Samávirkan á gerandis uppgávur
- Kunning í arbeiðnum og supervisión.

**Lønar- og setanartreytir:**
Talan er um fulltíðarstarv innan Nærverkið, og roknast má við, at arbeiðstíðirnar eru skiftandi dag-, kvøld-, og vikuskiftisarbeiði. Løn sambært avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.
Tann, ið settur verður, má kunna tola broytingar í starvinum, og at hetta kann verða umskipað til eisini at fevna um aðrar uppgávur.
Fleiri upplýsingar um starvið eru at fáa hjá Signu Andreasen, tlf. 333213.
Starvið verður sett 01.03.2007 ella skjótast møguligt aftaná.

**Umsókn:**
Umsókn við avriti av prógvum v.m. skal sendast til:
Stuðulstænastan
Sambýlið á Traðarvegi
360 Sandavágur
Stílað: Signa Andreasen

**Umsóknarfreist:**
5. februar 2007.

**Les meira um størvini á www.naerverk.fo/ leys størv**

*Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.*

NÆRVERKIÐ

sansir.fo

Meginskrivstovan, Postsmoga 3037, 110 Tórshavn, Tel 30 40 20, Faks 30 40 10, meginskrivstovan@naerverk.fo

**www.naerverk.fo**